Spurningar og svar 1: 02.12.2025

Ein veitari hevur sett tríggjar spurningar:

Spurningur 1: Er tað møguligt at fáa skaðahagtøl fyri akfarstryggingarnar seinastu 3-5 árini?

a. Er tað møguligt at sundurgreina tølini, so skaðahagtølini vísa skaðagongdina hjá akførum undir 3.500 kg. og teimum tyngri enn 3.500 kg.?

Spurningur 2: Fyri neyðsendaraakfør, har tit sambært rundskrivi nr. 9000 skula hava skrokktrygging, er tað møguligt at fáa upplýst umleið hvat dagsvirðið er á teimum ymsu akførunum?

Spurningur 3: Sambært pkt. D í útboðingarskrivinum verður Gjaldsstovan skrásett sum tryggingartakari. Vil tað siga, at vit stovna trygging og senda rokning til Gjaldsstovuna, sum síðan deilur út til teir ymsu stovnarnar? Harvið skula vit ikki stovna tryggingarnar undir 38 ymsu kundum?

Okkara svar:

Svar til spurning 1: Nei. Av tí at hetta eru hagtøl, sum stovnarnir sita inni við hvør sær, so ber ikki til hjá Keyp landsins at savna tey.

Svar til spurning 2: Sambært Sjúkrahúsverkinum, sum eigur neyðsendarakførini, so er nývirðið á einum sjúkrabili – við øllum – 1,5 mió kr.

Svar til spurning 3: Hetta er ein villa. Teir ymisku stovnarnir skulu standa sum tryggingartakari og skulu teir hava rokningarnar.

Hallur av Rana
Fulltrúi
02.12.2025

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO